# »Vit eru júst flutt heim til Føroyar«

Mánadagin í síðstu viku fluttu tey bæði Ruth Nolsø og Øystein Pætursson heim til Føroya.

–Vit hava búð í USA í góð tvey ár. Vit hava lisið og arbeitt, og hava trivist væl har yviri, greiðir Ruth Nolsø frá, tá vit spyrja hana, hvat tey fara at gera í summar.

– Nú skulu vit so bara koma upp á pláss, og eg skal finna mær eitt arbeiði, sigur Ruth Nolsø. Úr USA og til Føroya er ein long ferð, og eisini nakað av eini umskifting.

– Í USA er heitt vanligt, men beint áðrenn vit fóru vóru 35 hitastig, tí ódnin Alberto er. So, tað er ógvuliga kalt at koma heim nú, greiðir Øystein Pætursson frá.

Áðrenn Ruth og Øystein bæði komu heim úr USA, ferðaðust tey eitt sindur runt í landinum, millum annað vóru tey í Mary-Land og Cape Cod. Tey fara so ikki av landinum í summar, og hava fyri so vítt ongar fastlagdar planir sum so, uttan at tey ætla sær ein túr á Summar Festival.






















